Jón Sonni Jensen

# FLUX

Listaverkið FLUX, eftir Jón Sonna Jensen, er ein innseting á aðru hædd í miðbygninginum á Miðnámi á Kambsdali, sum bleiv tikin í brúk í 2025.

Verkið er sett saman av 29 einstøkum liðum, og tekur verkið støði í vætudynamikki. Vætudynamikkur er eitt øki innan alisfrøði, sum útgreinar hvussu vætur røra og mynstra seg, við støði í teirra egnu innbygdu fysiskum eginleikum og ávirkan uttanífrá.

Tvey sløg av høvuðselementum myndað verkið:
• Gipsverk, sum eru blendaði inn í veggin og fær hann at sýnast flótandi.
• Verk í skuggarammum úr ask, við brota- og løtumyndum umboðandi vætu í ymsum formum og úr ymsum tilfari. Sniðið á rammunum er grundað á entomologiskar rammur, sum vanliga húsa smákyktum og skordýrum.

Verkið umboðar eina líðandi gongd av seks evnum:
1. Dropin
2. Mynstur & Flatur
3. Náttúrumegi
4. Ávirkað væta
5. Lívrunnin væta
6. Mannagjørd væta (jarnvæta).

Íblásturin til FLUX kemur frá kjarnuvirðum skúlans um nýhugsan og forvitni, og kann listprýðingin hugsast sum ein myndbering fyri hesi virðir. Eins og væta seyrar inn í allar rivur har hon kann, má ein nýhugsandi og forvitin persónur, vera førur fyri at rannsaka allar tær rivur og spor, sum ein kann hugsa seg fram til, og sum eingin áður hevur hugsað í.

Tilfar, ið er nýtt í verkinum er: pappír, gips, pleksiglas, toy, folia, blaðsilvur, glas, bioskúm og epoksy.
Ein ørgrynna av tilgongdum eru nýttar, s.s.: modellering, dreying, formgerð, stoyping, samanseting, seyming, geislaskurður, blýant-, kol- og pennatekning, blindprent, glasblástur o.a.

Við vón um at listprýðingin, kann veita íblástur og forvitni, og vaksa í vavi við næmingunum ígjøgnum hesi árini á skúlanum, í takt við at tey mennast og teirra vitanargrundarlag økist, meðan tey, eins og væta, eru í 'flux' hesi árini.

Tøkk:
Lise-Lotte Vindelbo, Joel Coel, Jóannes Djurhuus, Karl-Aage Hansen, Jóna Rasmussen, Føroya Fólkaháskúli, Ingerð Tórmóðsdóttir Jønsson, Kristjan Jensen, Gabriel Apetrei, Maibritt Marjunardóttir, Ole Wich, Heiðrik á Heygum, Bárður Dal Christiansen, Bárður Reinert Poulsen, Hansina Iversen, Trina Gaard.

Undirveitarar:
Fablab á Kambsdali, Havnar Træsmiðja, Rammukarl, Deko&Print, Sóljan Glaslist, Steinprent.